## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, seinnapartin nakað minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av útnyrðingi og vestri. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, seinnapartin av norði. Okkurt ælið, men eisini sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og leygardagin okkurt ælið, men sunnudagin ývirhøvur turt. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Basim og Chief 1 gleða seg

**Hóast nakað av flogræðslu, so sigur Chief 1 seg vera spentan til Føroya-ferðina**

**TÓNLEIKUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í løtuni sita Basim og umboðsmaður hansara, Chief 1, og arbeiða við nýggju fløguni hjá Basim, sum kemur á marknaðin 7. august. Tað er sami dagur, sum SummarFestivalurin byrjar, og talan verður tí um frumframførslu av nýggju sangunum, tá Basim fer á pall leygardagin á festivalinum.

Talan verður ikki um eina playback-framførslu, men hevur Basim sjálvur tónleikarar við sær. Tey, sum spæla á ljóðførini, hava áður spælt við Nik & Jay, so tey vita, hvat tað vil siga, tá spælt verður live.

Chief 1 er eisini føroyavinur sjálvur. Seinasta árið hevur hann fyri tað nógva fingist við at framleiða tilfar til føroysku the Dreams, og eisini hevur hann brúkt sera nógva orku upp á at skapa teimum eitt gjøgnumbrot í Danmark.

Hetta hevur gingist væl higartil. Bólkurin hevur úr at gera komandi hálva árið. Millum annað við at spæla á fleiri donskum festivalum. Og sjálvandi eru teir eisini millum teirra, sum fara á pall í Klaksvík, tá SummarFestivalurin verður.




*Chief 1 og Basim arbeiða í løtuni við at leggja seinastu hond á fløguna, sum kemur út tann 7. august*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 33 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 29 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. skamt sunnan fyri Føroyar fer skjótt eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 992 hPa. eystan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir.



**Í dag:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum fer í landnyrðing og dregur kalda luft av norði móti Føroyum

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/07 kl. 06⁰⁰ – 14/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 13/07 kl. 06⁰⁰ – 14/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 51 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

10. juli Fyrra kvarter
14. juli Mánin longst frá jørðini
18. juli Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. juli | 5:22 | 17:45 | 4:22 | 16:45 | 4:37 | 17:00 | 7:22 | 19:45 | 8:22 | 20:45 | 3:37 | 16:00 | 2:37 | 15:00 | 5:37 | 18:00 | 6:37 | 19:00 | 5:07 | 17:30 | 6:22 | 18:45 |
| 16. juli | 6:08 | 18:31 | 5:08 | 17:31 | 5:23 | 17:46 | 8:08 | 20:31 | 9:08 | 21:31 | 4:23 | 16:46 | 3:23 | 15:46 | 6:23 | 18:46 | 7:23 | 19:46 | 5:53 | 18:16 | 7:08 | 19:31 |
| 17. juli | 6:49 | 19:12 | 5:49 | 18:12 | 6:04 | 18:27 | 8:49 | 21:12 | 9:49 | 22:12 | 5:04 | 17:27 | 4:04 | 16:27 | 7:04 | 19:27 | 8:04 | 20:27 | 6:34 | 18:57 | 7:49 | 20:12 |
| 18. juli | 7:36 | 19:57 | 6:36 | 18:57 | 6:51 | 19:12 | 9:36 | 21:57 | 10:36 | 22:57 | 5:51 | 18:12 | 4:51 | 17:12 | 7:51 | 20:12 | 8:51 | 21:12 | 7:21 | 19:42 | 8:36 | 20:57 |
| 19. juli | 8:18 | 20:38 | 7:18 | 19:38 | 7:33 | 19:53 | 10:18 | 22:38 | 11:18 | 23:38 | 6:33 | 18:53 | 5:33 | 17:53 | 8:33 | 20:53 | 9:33 | 21:53 | 8:03 | 20:23 | 9:18 | 21:38 |

Lesið Sosialin